## Vestmenningur og Fram inni við 250 tonsum

Gulllaksaskipini Vestmenningur og Fram landaðu í morgun. Teir fóru til fiskiskap 8. august og hava tilsamans 250 tons av gulllaksi. Vestmenningur landar í Vestmanna, og Fram landar til Tavuna í Leirvík. Vestmenningur og Fram fara nýggjan túr í kvøld.

## Vilja nokta Tobba at seta sjómannadagin

Sum siður er hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, á hvørjum árið sett Føroya Sjómannadag - eins og formaðurin í vinnunevnd løgtingsins handar heiðurstekin til bestu skip og bátar. Olivur Joensen, fyrireikari sigur, at í gjárakvøldið móttøk Føroya Sjómannadagur soljóðandi skriv við 50 undirskriftum: "Undirritaðu fiskimenn og reiðarar vilja hervið siga frá, at vit halda at frálíka tiltakið við einum sjómannadegi, ikki skal oyðileggjast av, at sitandi fiskimálaráðharri, ið heilt ókritiskt hevur valt at oyðileggja okkara fiskidagaskipan, skal seta ráðstevnuna. Um sjómannadagurin framhaldandi skal verða ein hátíðardagur, væl stuðlaður av fiskivinnuni, vóna vit, at nevndin fyri sjómanndagin velur at biða annað umboð seta sjómannadagin." Seinri í dag skuldi nevnin á fundi at viðgera brævið.

# lumtjóða kanning



*Skálaberg hevur útvegað sær vísindaliga ekkolodsútgerð, sum skrásetir og skjalfestir øll data á teldu*

meting av, hvussu nógvur fiskur er undir skipinum, og tá "umroknar" nýggja útgerðin tað, hon skrásetir, til tons.

- Ekkóið, sum ekkoloddið skrásetir, sigur okkum nakað um støddina á fiskinum, og her er tað soleiðis, at nógv luft í summmaganum á fiskinum, sum er undir, gevur meira ljóð á ekkoloddinum, sum fiskifrøðingurin tekur til.



*Hetta er fyrstu ferð, at Fiskirannsóknarstovan hevur leigað føroyskt fiskiskip til eina millumtjóða kanning av hesum slagi*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Á landgrunninum eru útlitini rímiliga góð, meðan verri sær út á Føroyabanka*

# Alt er ikki so dapurt

**- Gýtingin hjá toski á landgrunninum er beint omanfyri miðal, gróðurin á landgrunninum er yvir miðal, og nógv er til av plantu-og djóraæti eins og av nebbasild. Tað sigur Fiskirannsóknarstovan á síni heimasíðu**

FISKASTOVNAR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Tá Fiskirannsóknarstovan gjørdi yngul-og ætikanningar í summar, var nøgdin av toskayngli á landgrunninum miðal, samstundis sum gróðurin á landgrunninum var yvir miðal, og nógv var til av plantu-og djóraæti.

- Eftir at nøgdin av toskayngli í fleiri ár hevur verið minkandi, og seinastu trý árini á sera lágum støði, er nøgdin nú beint omanfyri miðal. Hetta er sera áhugavert, tá hugsað verður um framtíðartilgongdina til toskastovnin. Fiskirannsóknarstovan sigur, at endaliga boðið uppá, hvussu gýtingin hjá toski hevur hildnast, fæst ikki fyrr enn við endanum av uppvakstrartíðini, sum tikið verður til.

- Sera lítið hevur verið av nebbasild á landgrunninum seinastu trý árini, men í ár bragdaði aftur. Hetta er tað besta árið alt tíðarskeiðið síðan 1997. Tað skuldi tískil verið nógv føði til steðgar, bæði hjá fugli og fiski, nú eisini nógv er til av hvítingsbróðuri, sigur Fiskirannsóknarstovan á síni heimasíðu.

Mangt bendir tí á, at náttúran aftur er við okkum, og tað er altíð hugaligt og plagar at síggjast aftur í veiðini, áðrenn langt um líðir.

### Verri á Bankanum

Á Føroyabanka gongur verri enn á landgrunninum annars.

Kanningarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni vístu, at lítið av plantuæti er at síggja á Føroyabanka, og har var eisini lítið av fiskayngli, sum hartil eisini var smáur.